†

Kunngjørt verður at okkara elskaða mamma, omma og langomma

**Andrea á Regni**
av Toftum

andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi 2. september 2003, 85 ára gomul.

Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík leygardagin 6. september 2003 kl. 18.00 í kirkjuna. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni sunnudagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini**

Tey, ið ynskja at minnast Andreu við kransi ella blómum, kunnu ístaðin lata eina gávu til Eysturoyar Røktar- og ellisheim, konti í peningastovnunum.

†

Elskaði maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Finnur Lómstein**
Tórshavn
ættaður úr Syðrugøtu

andaðist á Landssjúkrahúsinum 3. september, 60 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer sunnudagin 7. september kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Jórun, Erika, Anna, Birgit og Dora**

# Maður brann inni við Strond

**Klokkan 21.30 hóskvøldið fekk løgreglan í Havn fráboðan um ein brand úti við Strond í Havn. Ein 65 ára gamal maður brann inni**

BRANDUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Hóskvøldið var enn ein sorgarleikur í sambandi við eldbrand. Ein 65 ára gamal maður brann inni í einum húsum úti við Strond, og løgreglan fekk fráboðan um eldin um hálvgum tíggju tíðina.

Løgreglan sigur í viðmerking um tilburðin, at orsøkirnar til eldin enn eru ógreiðar.

- Vit hava ongar ábendingar um, hví eldur kom í húsið við Strond, sigur Bergleif Brimvík av Løgreglustøðini.



*Klokkan 21.30 hóskvøldið fekk løgreglan í Havn fráboðan um ein eldbrand úti við Strond í Havn, har ein 65 ára gamal maður brendi inni*

## Hjálp úr Danmark

Bergleif Brimvík vísir víðari á, at Løgreglustøðin í Havn hevur boðsent serfrøðingum úr Danmark at hyggja nærri at tilburðinum.

- Fyri at fáa greiðu á málinum hava vit vent okkum til Danmarkar. Ein kriminalteknikari, ein maður úr Danmarks Brandteknisk Institut og ein rættarmedisinari koma til Føroya, og vónandi verða teir ein hjálp, sigur Bergleif Brimvík.

Sostatt kann enn ein sorgarleikur staðfestast, hesaferð úti við Strond, har 65 ára gamli maðurin ikki megnaði at koma út úr húsum sínum.

# Motorsúkklur fara kring Suðuroynna

**Um vikuskifti fáa suðuroyingar vitjan av motorsúkklum, ið gera túr til Suðuroyar og koyra oynna á tamb. Føroya MC Boogie 2003 er um vikuskiftið og á skránni eru túrar og bikerparty í Øravík**

MOTORÁHUGI
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tann 6. og 7. september eru væntandi væl fleiri motorsúkklur at síggja á vegunum í Suðuroynni, enn vanligt er.

Á heimasíðuni hjá Føroya Ellisakførum sæst, at Føroya MC Boogie 2003 II verður í Suðuroynni hesar dagarnar. Tað merkir, føroyskir motorsúkklukoyrarar hittast til henda túr, og hesaferð liggur leiðin suðureftir.

Neyv skrá er at síggja á heimasíðuni www.ellisakfar.com . Farið verður við Smyrli klokkan 10 leygarmorgunin. Í Suðuroynni verður vitjað á Tvøroyri og Famjin og seinnapartin verður farið til Vágs og bygdirnar í syðru helvt. Steðga verður á Vágseiði klokkan 15 og í Sumba verður vitjað klokkan 16. Steðgur er í Akrabergi, har koyrararnir fáa sær ein kaffimunn. Síðani verður farið um Hestin og klokkan 18 verður farið til Øravíkar, har haldast skal til.

Á kvøldi er veitsla, sonevnt bikerparty, har Headache Blues Trio spælir eftir borðhald.

Sunnudagin vitja "bikararnir" neystið hjá Naddoddi og seinnapartin klokkan 15:30 verður vitjað í Hvalba og Sandvík og síðani aftir til Drelnes klokkan 16:30.

Sostatt hava suðuroyingar høvi at síggja motorsúkklur í hópatali um vikuskiftið og óivað er onkur Harley Davidson teirra millum. Hetta hevur óivað áhuga hjá onkurum, nú henda súkklan, sum sigst bera av øllum, hevur 100 ár á baki í ár.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu tá kæri bróður og pápabeiggi okkara

**Jógvan Guðmundsson**

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri blómur og kransar.
Ein serlig tøkk til øll, sum vóru um hann á Sambýlinum.
Tøkk til øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Óla Jákup**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum teimum, sum gleddu meg á 80-ára degnum.

**Hanna Augustinussen, Vágur**

## Tøkk

Takk fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Sofus Andreas Hansen**
Saltangará

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Petur Sørensen, Pól Johs. Johannesen og Jógvan Fríðriksson fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til Heina Lützen fyri vakra sangin.
Tøkk fyri vitjanir og alla hjálpina til jarðarferðina.

*Familjunnar vegna*
**Signhild**
**Sólvá, Anna, Arnhild, Petur Chr. og Signar**

## Tøkk

Øllum tykkum mongu, sum á ymiskan hátt mintust til mín á 70 ára føðingardegnum 19. juli og harvið gleddu meg og gjørdu føðingardagin so hugnaligan og minnisríkan, takki eg hjartaliga.

**Vinarligar heilsanir**
**Hilmar Bech**



# Norðurlendskur Náttarravnadagur


*Allir Náttarravnafelagsskapirnir í Norðurlondum fara nú undir eitt felagssamstarv. Og komandi ár er ætlanin at hava eina stóra norðurlendska ráðstevnu, har ljóskastarin verður settur á, hvussu tryggleiki og trivnaðurin hjá ungum kann økjast*
*Mynd: Náttarravnarnir*

**Í dag er norðurlendskur Náttarravnadagur. Hetta er byrjanin til eitt norðurlendskt samstarv millum øll Náttarravnafeløgini í Norðurlondum. Feløgini halda, at nú er stundin komin til at gera eina felags samstarvsavtalu**

NÁTTARRAVNAR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Náttarravnadagurin verður hildin í øllum Norðurlondum í dag, leygardagin 6. september. Umframt at vera byrjanin til eitt samstarv, so verður hesin dagurin afturvendandi, har tey lokalu feløgini fara at vísa, at tey eru til við ymsum almennum tiltøkum. Eisini í Havn fara tey at seta sín serstaka lit á gøturnar.

Náttarravnarnir fara allir, sum kunnu, út í býin at ganga í teirra eyðkendu gulu jakkum. Tey fara at býta tilfar út um Náttarravnarnar og práta við tey, sum vilja vita meira um felagsskapin.

Í gongugøtuni í Havn verður eitt kaffiborð, har tey fara at selja kaffi, kakao og heimabakað.

Frá felagsskapinum verður sagt, at tey fegin vilja koma á tal við fólk og hoyra teirra hugsan um, hvussu trygdin og trivnaðurin hjá ungdóminum í høvuðsstaðnum kann økjast. Felagsskapurin vónar at fáa nógvar nýggjar limir, og møguleiki verður eisini til at tekna seg sum stuðulslim. Fyri 100 krónur um árið kunnu øll privatfólk stuðla Náttarravnunum, meðan fyritøkur, feløg, handlar, stovnar og onnur kunnu gerast stuðlar fyri 500 krónur um árið.

## Norðurlendsk ráðstevna í 2004

Í samstarvsavtaluni, sum byrjar í dag, verður avtalað, at tað skal verða hildin ein Norðurlendsk ráðstevna 4.-5. september 2004. Á ráðstevnuni verður ljós kasta á at vísa, hvussu vanlig ábyrgdarfull vaksin kunnu verða við til at økja um lokalu trygdina og lívsgleðina hjá børnum og ungum – uttan at tað krevst tað stóra av tí einstaka, og í góðum samstarvi við almennar og privatar samstarvsfelagar.

Eitt mál er, at Norðurlondini senda hvør sítt stjórnarumboð til ráðstevnuna – helst stjórnaleiðaran, fyri at stuðla upp undir tað sjálvbodna fyribyrgjandi arbeiðið, sum allar stjórnirnar eftirlýsa.

Náttarravnarnir gera mun. Tað vísa hagtøl í hinum Norðurlondunum. Í onkrum føri er talan um eina lækking upp á 50 % í herverki og harðskapi, bara tí at Náttarravnarnir eru tilstaðar. Ein ravnur leggur seg ongantíð beinleiðis upp í trupulleikar á gøtuni, men bara tað at teir eru har, hevur sum sagt gjørt mun.

Í Svøríki eru 290 lokalfeløg, 360 eru í Noregi, 120 í Danmark, fimm í Grønlandi og nøkur eru í Finnlandi eisini. Í Føroyum er so bara tað eina lokalfelagið enn, og tað hevur tvey ár á baki nú. Enn finnast ongi føroysk tøl fyri, at staðfesta, hvørja ávirkan Náttarravnarnir hava herheima, men tað er ongin ivi um, at Náttarravnarnir við at ganga í gøtunum um náttartíð økja um trygdarkensluna hjá teimum ungu.

